# VIÐTØKUR

# fyri

# P/F Tryggingarfelagið LÍV

**1. Navn**

1.1. Navn felagsins er P/F Tryggingarfelagið LÍV.

1.2. Felagið hevur hjánøvnini LÍV og Føroya Lívstrygging.

**2. Endamál**

2.1. Endamál felagsins er at reka lívstryggingarvirksemi og annað virksemi í hesum sambandi. Í felagnum kunnu teknast øll sløg av lívs-, eftirlønar- og pensiónstryggingum. Felagið kann eisini yvirtaka nevndu sløg av tryggingum í endurtrygging.

2.2. Felagið kann eisini í virksemi sínum eiga partabrøv í øðrum feløgum, umsita peningaognir og umsita rakstur av øðrum feløgum v.m., eiga og reka fasta ogn o.t., og allan handil í hesum sambandi.

**3. Partapeningurin**

3.1. Partapeningur felagsins er kr. 25.000.000,-.

3.2. Partarnir eru kr. 1,- til støddar ella multipli av hesum og býttir soleiðis:

**A-partapeningur:**
Ognarfelagið LÍV áljóðandi kr. 12.500.000 ella 50%.

**B-partapeningur:**
P/F Fakfelag áljóðandi kr. 12.500.000 ella 50%.

3.3. Partapeningurin er fult inngoldin.

**4. Partabrøv**

4.1. Partabrøvini skulu ljóða uppá navn og vera skrivað inn í eigarayvirlit felagsins.

4.2. Partabrøvini skulu ikki vera umfaraskjøl.

4.3. Alt samskifti millum felagið og partaeigarnar fer fram umvegis teldupost. Hvør partaeigari hevur skyldu at fráboða felagnum ein teldupostbústað, hvagar øll boð og fráboðanir frá felagnum kunnu sendast.

4.4. Partaeigararnir hava ikki skyldu at lata partabrøv síni innloysa.

4.5. Eingi partabrøv hava serlig rættindi, men munur kann gerast á A- og B-partapeninginum í samband við útlutan av vinningsbýtið, sbrt. pkt. 6.

4.6. Partabrøv verða ikki útskrivaði. Prógv fyri skráseting í eigarayvirlitinum verður útskrivað eftir áheitan.

## 5. Avhendan

5.1. Partapeningur kann bert avhendast við loyvi frá nevndini í felagnum, sum tó ikki uttan sakliga grund kann nokta samtykki til avhendingina.

5.2. Avhendan fevnir um eitthvørt skifti av ognarrætti og/ella atkvøðurætti (tó burtursæð frá atkvøðufulltrú til ein ávísan aðalfund) av einum parti, herundir avhending til ognar ella trygd, gáva, øll sløg av rættarsókn ella um búviðgerð/skiftiviðgerð byrjar, herundir konkursviðgerð.

5.3. Eigaraavtala er gjørd millum partaeigarnar, ið regulerar hesi viðurskifti:

- Skifti av partapeningi
- Forkeypsrættur
- Kursáseting í samband við skifti
- Mannagongd í samband við skifti
- Veðsetan av partabrøvum

## 6. Vinningsbýti

6.1. Partaeigararnir kunnu hava rætt til vinningsbýti í tann mun felagsins fíggjarliga støða, rakstur og tørvur annars loyva tí, og í tann mun útgjaldið er forsvarligt og lógligt sambært galdandi reglum.

6.2. Við útlutan av vinningsbýti kann vinningsbýtið býtast ósamsvarandi millum kapitalflokkarnar. Við útlutan av vinningsbýti hevur A-partapeningurin framíhjárætt til ein nærri ásettan fyrsta part av tí vinningsbýti, sum aðalfundurin samtykkir at útluta. Hesin fyrsti partur skal býtast millum kapitalflokkarnar í lutfallinum 9:1, soleiðis at A-partapeningurin móttekur 9/10 og B-partapeningurin móttekur 1/10.

Vinningsbýti, sum verður útlutað út yvir henda fyrsta part, skal býtast javnt millum kapitalflokkarnar, soleiðis at A-partapeningurin móttekur 1/2 og B-partapeningurin móttekur 1/2.

6.3. Aðalfundurin tekur avgerð um útgjald av vinningsbýti eftir tilmæli frá nevndini.

7. **Uppsøgn - innloysan av partabrøvum**

7.1. Um partaeigaramir gerast varandi ósamdir og ikki kunnu tosa seg til rættis um teir spurningar, sum ósemja er um, og eingin semja fæst, eru partarnir samdir um, at samstarvið millum partaeigararnar so má kunna halda uppat.

7.2. Um samstarvið partanna millum má halda uppat, hava partamir sinamillum rætt til at innloysa hvønn annan eftir reglum, ið eru ásettar nærri í eigaraavtaluni.

8. **Elektroniskt samskifti**

8.1. Í øllum samskifti millum felagið og partaeigararnar kann elektroniskt samskifti, t.e. elektroniskt skjalaskifti og elektroniskur postur (teldupostur), verða brúkt í staðin fyri at senda ella vísa pappírsbundin skjøl. Einstaki partaeigarin hevur ábyrgd av at tryggja, at felagið altíð hevur teldupostadressuna hjá viðkomandi partaeigara.

8.2. Felagið kann sostatt millum annað senda innkalling til og fundarskrá fyri aðalfundir, ársroknskap og aðra kunning umvegis teldupost.

8.3. Partaeigarnir kunnu til eina og hvørja tíð biðja felagið um at veita upplýsingar um krøvini til skipanirnar og um mannagongdina fyri elektroniska samskiftinum.

9. **Aðalfundur**

9.1. Aðalfundurin verður skipaður av partaeigarum, ið hava eina atkvøðu fyri hvørt partabræv á kr. 1,-.

9.2. Aðalfundur verður fráboðaður 14 dagar frammanundan við telduposti til hvønn einstakan kapitaleigara og við lýsing á heimasíðu felagsins. Fráboðanin skal innihalda fundarskrá við tilskilan av fundarstaði og -tíð. Av fundarskránni skal síggjast hvørji mál, ið skulu viðgerast á aðalfundinum.

9.3. Vanligur ársaðalfundur verður hildin á hvørjum ári fyri 1. mai til at viðgera:

1. Frásøgn nevndarinnar um virki felagsins í farna roknskaparári
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
3. Avgerð um hvussu møguligt avlop ella tap sambært roknskapinum verður nýtt
4. Val av nevndarlimum
5. Val av grannskoðan
6. Uppskot til lønarpolitikk
7. Møgulig uppskot, ið nevndin ella partaeigararnir ynskja at viðgera

9.4. Aðalfundurin kann haldast við vanligari uppmøtan ella við elektroniskari luttakan.

9.5. Allir partaeigarar hava heimild til skrivliga at frambera uppskot til viðgerðar á aðalfundinum. Hesi uppskot skulu setast á dagsskrá til tann fyrsta aðalfundin, sum hildin verður i mesta lagi 4 vikur aftaná at uppskotið er latið inn.

## 10. Eykaaðalfundur

10.1. Eykaaðalfundur verður lýstur, tá ið stjórnin, nevndin, ein aðalfundur ella grannskoðari vil, ella tá ið partaeigarar, ið tilsamans eiga 5% av partapeninginum, skrivliga krevja tað til at viðgera evni, ið samstundis verður tilskilað.

## 11. Fundarrættur og fundarstjóri

11.1. Atgongd til aðalfundin hava partaeigarar, ið eftir eigarayvirlitinum kunnu prógva, at teir eru partaeigarar. Partaeigari kann skrivliga geva øðrum partaeigara fulltrú til at fara á fund og greiða atkvøðu hansara vegna.

11.2. Aðalfundurin verður stýrdur av einum av nevndini valdum fundarstjóra.

## 12. Atkvøðugreiðsla

12.1. Á aðalfundinum verða øll mál at gera av við vanligum atkvøðumeiriluta.

12.2. Partaeigaramir eru samdir um, at avgerðir av stórum týdningi fyri felagið ella onkran av partaeigarunum ikki kunnu takast, hvørki á aðalfundi ella á nevndarfundi uttan so, at partaeigaramir eru samdir. Avgerðir av stórum týdningi eru:

- Broyting av viðtøkum felagsins
- Uppskot til aðalfundin um vinningsbýti
- Upptøka av lánum
- Ásetan av krøvum til figgjarliga rapportering/stýring til nevndina og til partaeigararnar
- Avgerðir um munandi víðkan av virksemi felagsins, herundir hækking og/ella lækking av partapeningi felagsins
- Sølu av virki og/ella virksemi felagsins

12.3. Tað, sum verður havt til umrøðu á aðalfundinum, verður ført i eina fundarbók, sum verður undirskrivað av fundarstjóranum.

## 13. Nevndin

13.1. Í nevndini sita 5 nevndarlimir, valdir av aðalfundinum.

13.2. Partaeigarnir eru samdir um at miðast skal eftir, at nevndin verður vald við semju partanna millum við tí fyri eyga at fáa eina so kompetenta og vælvirkandi nevnd sum gjørligt, og skulu partaeigarnir frammanundan aðalfundinum ummæla nevndarvalið við atliti til at fáa semju um nevndarlimirnar og formannin. Um semja ikki fæst, verður nevnd felagsins vald eftir uppskoti frá partaeigarunum soleiðis:

- P/F Fakfelag: 2 nevndarlimir

- Ognarfelag Tryggingartakaranna: 2 nevndarlimir
- Formannin skulu partarnir semjast um

13.3. Partaeigarnir binda seg til at atkvøða fyri teimum limum, sum hvør av partaeigarunum á aðalfundi skjýtur upp.

13.4. Hvør partaeigari bindur seg til at boða hinum partaeigarunum frá teirra uppskoti til nevndarlim í seinasta lagi 7 dagar áðrenn aðalfundin.

13.5. Nevndin hevur fund so ofta formaðurin heldur tað vera neyðugt ella um ein av hinum nevndarlimunum ynskir tað.

13.6. Eingin avgerð kann verða tikin á nevndarfundi, uttan so, at í minsta lagi 2/3 av nevndarlimunum eru á fundi.

13.7. Skrivlig frásøgn, ið skal innihalda m.a.a fundarumrøður og viðtøkur, skal gerast av øllum nevndarfundum.

**14. Stjórn**

14.1. Nevndin setur ein stjóra.

**15. Tekning**

15.1. Felagið verður bundið við undirskrift av allari nevndini ella formanninum saman við einum stjóra.

**16. Grannskoðan**

16.1. Á hvørjum ársaðalfundi verður valdur ein grannskoðari, ið skal vera løggildur.

16.2. Við ársuppgerð skulu eisini verða gjørdar – eftir nevndarinnar ætli – neyðturvuligar avskrivingar og niðurskrivingar, sambært lóg.

**17. Roknskaparár**

17.1. Roknskaparár felagsins er álmanakkaárið.

* * * * *

Soleiðis samtykt á eykaaðalfundi tann 29. juni 2026.

________________________________

Kári Davidsen, advokatur